TING-HELLAN

Dánjal Poulsen, Felagið Vinir Ísraels í Føroyum:

# Kanska friðaravtala, men neyvan full semja millum jødar og palestinar

**Ein nýggj palestinsk leiðsla kann koma væl við í friðartilgongdini, heldur Dánjal Poulsen, sum heldur at Yassir Arafat gjørdi onki fyri at steðga yvirganginum móti Ísrael**

MIÐEYSTUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



Deyði Arafat kann vera ein nýggjur møguleiki fyri friði millum palestinar og ísraelar. Hetta heldur formaðurin í felagnum Vinir Ísraels, Dánjal Poulsen. Hann metir, at ein nýggj vælvirkandi, demokratisk palestinsk leiðsla kann fáa stóran týdning fyri møguleikunum at fáa frið í lag.

– Ein væl skipað palenstinsk leiðsla, sum fyrst og fremst er før fyri at skapa lóg og landaskil, kann eisini vera við til at skapa frið í Miðeystri. Vit hava góðar vónir til at nýggja leiðslan fer at virka fyri einum friðarsáttmála, sigur Dánjal Poulsen.

– Tey seinastu fýra árini hava verið merkt av nógvum yvirgangi móti tilvildarligum málum í Ísrael, og tað kann ikki halda fram, sigur Dánjal Poulsen.

Spurningur: Var Arafat so ein forðan fyri at fáa frið í lag?

– Tað er ikki vist at Arafat einsamallur var forðanin fyri friðinum. Um tað vísir seg, at tann nýggja palestinska leiðslan hevur somu støðu sum hann, so var tað ikki Arafat, ið var avgerandi, sigur Dánjal Poulsen.

Felagið Vinir Ísraels hevur í dag um eitthundrað limir. Formaðurin sigur, at felagið hevur tað grundsjónarmið, at jødarnir hava rætt til landið Ísrael, við tað

*Dánjal Poulsen, formaðurin í felagnum Vinir Ísraels*



at Gud lovaði Ábrahami hetta økið til fólk sítt. Felagið metir eisini, at bíblian staðfestir, at jødarnir eru eitt serstakt, útvalt fólk, sum er sera týdningarmikið fyri allan heim. Føroyska vinafelagið er langt frá tað einasta av sínum slagi. Í nógvum londum eru ísraelsk vinafeløg.

– Høvuðstrupuleikin er at palestinar so treyðugt vilja góðtaka jødar og aðalmálið hjá PLO er at beina fyri Ísrael.

- Hetta hava vit sæð við tað at teir gera onki fyri at steðga teimum víðgongdu bólkunum at fremja yvirgang móti Ísrael.

### Yvirgangsmaður

Sum tað eisini stendur at lesa aðrastaðni á Tinghelluni, so eru nógv ymisk orð nýtt at lýsa

*Framhald á næsu síðu*

# Yvirgangsmaður til evstu løtu

TINGHELLUKLUMMAN
*Finnbogi Ísakson*



Tað kann tykjast eitt sindur rangvørgt, at umboð fyri 60 stjórnir í heiminum fóru til Egyptalands at fylgja Yasser Arafat til gravar, samstundis sum stjórnir í mongum av hesum somu londum í viðmerkingum til deyða hansara søgdu seg hava vónir um, at nú fór at bera betur til at fáa frið í lag í Miðeystri. Tað var heldur ikki bara onkur, sum fór at fylgja. Úr Svøríki fór sjálvur forsætisráðharrin Göran Persson, og úr hinum norðurlondunum fóru uttanríkisráðharrarnir. Úr teimum arabisku londunum fóru landsins leiðarar ella næstumenn teirra.

Í fjølmiðlum um okkara leiðir hevur Arafat verið umrøddur sum yvirgangsmaðurin, ið gjørdist statsmaður. Spurningurin er, um hetta er rætt. Gjørdist hann nakrantíð statsmaður? Ella var hann alla sína tíð yvirgangsmaður, myndaliga sæð ílatin diplomatfrakka?

Hann varð føddur í Kairo í Egyptalandi 24. august 1926, og har vaks hann eisini upp. Foreldrini vóru palestinarar, men hetta helt Arafat ikki vera nóg góða trygd fyri, at palestinarar fóru at góðtaka hann sum leiðara, og tí helt hann sjálvur fast við, at hann var føddur í Jerusalem 4. august hetta árið. Hann gjørdist formaður í Palestinska Studentafelagnum í Kairo, og tað var ikki sørt av einum avriki, tí hann kom frá fátækrafólki, og hetta starv plagdu annars studentar frá múgvandi fólki at røkja. Hann tók embætisprógv sum byggiverkfrøðingur.

Hann var við í fyrsta ísraelska-arabiska krígnum í 1948. Eftir loknan lestur fór hann saman við øðrum palestinarum til Kuwait, har teir stovnaðu yvirgangsfelagsskapin Al Fatah. Teir hildu síðani til í Sýrialandi, á Vestara Áarbakka og í Libanon, haðani teir framdu yvirgang móti Ísrael og kravdu ein palestinskan stat.

Fleiri aðrir yvirgangsfelagsskapir vórðu stovnaðir. Í 1968 vórðu allir samskipaðir í Palestinsku Frælsisfylkingina PLO við Yasser Arafat sum leiðara. Umheimurin gjørdist rættiliga varugur við bardagan hjá palestinarum í 1972, tá Svarti September framdi yvirgang móti ísraelsku ítróttafólkunum á Olympisku Leikunum í München. 10 ísraelsk ítróttafólk doyðu í atsóknini.

Nøkur ár seinni hevði Ísrael ábyrgdina av einari atsókn, sum ikki var minni óhugnalig. Ísraelski verjumálaráðharrin Ariel Sharon, sum hevur verið ísraelskur forsætisráðharri síðani 2001, gav í 1982 kristnum falangistum loyvi at fara inn í palestinsku flóttafólkalegurnar Sabra og Chatila í Beirut, har teir eirindaleyst myrdu fleiri hundrað verjuleysar menn, kvinnur og børn.

Nakað eftir atsóknina í München fór Arafat at royna seg á politiska/diplomatiska økinum og fanst oftari og oftari at yvirganginum. Men í 1990 forroknaði hann seg. Øðrvísi enn flestu arabaralond fór hann í part við Saddam Hussein og vardi hansara innrás í Kuwait. Eftir Flógvakríggið stóð Arafat rættiliga einsamallur, men í 1993 fekk hann aftur góðan byr, tá hann skrivaði undir Osloavtaluna um eina friðartilgongd. Longu árið eftir fingu hann, ísraelski forsætisráðharrin Rabin og uttanríkisráðharrin Peres friðarløn Nobels.

Tað var heldur skjótt. Nú 10 ár aftaná er framvegis ongin friður. Ein víðgongdur jødi myrdi Rabin, og Arafat er deyður. Shimon Peres er aftur formaður í Arbeiðaraflokkinum, sum er í andstøðu í tinginum Knesset. Barak, sum gjørdist forsætisráðharri eftir Rabin, royndi - við Clinton forseta sum millumgongumanni - at fáa frið í lag, men einki spurdist burturúr. Og síðani er harðskapurin bara øktur - við palestinskum sjálvmorðsbumbum og hevnd frá ísralska herinum.

Øll ásanna, at Arafat var tann sterki maðurin í Palestinsku Økjunum. Hann læt ongan annan, sum ikki kundi semjast við hann, sleppa framat. Men stýringin av økjunum hevur ikki verið góð. Korrupsjónin hevur florerað, samstundis sum fátækradømið er ómetaliga stórt, hóast peningur floymir ár um ár frá hinum arabaralondunum til palestinarar. Summi vilja vera við, at nógvir pengar endaðu í lummanum hjá Arafat sjálvum.

Stríð tók seg upp um henda pening, longu meðan Arafat lá á deyðastrá, skrivaði Tel Aviv-tíðindakvinnan hjá Politiken, Hanne Foighel. Tað var konan Ruha Arafat, sum vildi vissa sær og dóttrini Zahwa eina trygga fíggjarliga framtíð. Yasser Arafat hitti Suha, meðan hann var í útlegd í Tunis í áttatiárunum, eftir at ísraelsmenn, sum høvdu hersett stóran part av Libanon, høvdu rikið palestinarar av landinum.

Suha var tó ikki saman við honum hesi seinastu árini, tá ísraelsmenn høvdu hann innibyrgdan í býnum Ramallah á Vestara Áarbakka. Nú tá hann legðist sjúkur, kom hon at vitja hann, fyri fyrstu ferð í 4 ár. Arafat varð fluttur á eitt hernaðarsjúkrahús uttan fyri Paris. Mangar leysasøgur gingu um sjúku hansara, og umboðsmenn fyri palestinska sjálvstýrið komu til Paris at kanna, hvussu til stóð. Í fyrstani noktaði Ruha teimum atgongd og segði, at teir vildu jarða Arafat, áðrenn hann var deyður. Men so slakaði hon og loyvdi teimum inn.

Summar keldur vilja vera við, at hon slakaði, tí hon fekk lyfti um, at hon og Zahwa skuldu fáa 11-12 mió.kr. í eftirløn. Fíggjarliga ráðgevari hennara - og sambúgvi tey seinastu árini, sigst - libanesarin Rizk vann í 1999 eitt sakarmál móti Arafat um meira enn 100 mió.kr.

Arafat er deyður, og tað muga vit syrgja, søgdu ríkisleiðarar og politikarar úr heimsins londum fyri fáum døgum síðani. Men friðarútlitini eru betri, nú hann er deyður, søgdu teir eisini. Ein løgin samanseting.

Kanska kemst tað av, at nógvir leiðarar eru ikki heilt ósamdir við ísraelsku stjórnina, sum tey seinastu árini hevur hildið fast við, at hon vildi ikki samráðast við ein yvirgangsmann, tvs Arafat. Sjónvarpið vísti fyri fáum døgum síðani eina franska sending, har sjónvarpsliðið var sloppið á fjølmentan fund í Ramallah, har Arafat talaði. Í røðuni mælti hann ikki til frið, men eggjaði palestinarum til at stríðast, stríðast, stríðast til seinasta blóðsdropa.

Tað man tó vera ivasamt, um tað verður so nógv lættari at fáa frið í lag, nú yvirgangsmaðurin í diplomatfrakka er deyður. Mangir eygleiðarar ivast í, um Sharon vil hava frið ella stríðast fyri einum Stórísrael. Víðgongdir flokkar í Knesset og víðgongdir niðursetumenn vilja heldur ikki slaka.

Og palestinsku megin fara vist altíð at vera bólkar, sum als ikki vilja góðkenna ísraelska statin. So leingi hesir víðgongdu bólkar finnast báðu megin kann í mesta lagi ein ófriðarligur friður fáast í lag.



# Eitt lagnuval

Forsetavalið í Ukraina í morgin kann fáa avgerandi ávirkan á landsins framtíð og tess viðurskifti við Vesturheimin og Russland. Tvey ólík valevni stilla upp

VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tvær bumbur bresta á einum marknaðartorgi. Eitt fólk fær doyr, og trettan fáa skaða. Løtu seinni tekur løgreglan fimm fólk og kunnger, at tey uppi í einum harkaliði hjá andstøðuni, og at endamálið er at spilla myndugleikarnar út. Andstøðan vil vera við, at tað eru myndugleikarnir, sum hava lagt bumburnar. Stutt eftir er valevnið hjá andstøðuni um at lata lív orsakað av eitran, og hann ivast ikki í, at myndugleikarnir hava skipað fyri. Valevnið hjá myndugleikunum má eisini á sjúkrahús, tí onkur hevur tveitt egg eftir honum.

Vit eru í forsetavalstríðnum í Ukraina.

Leonid Kutsjma, forseti, hevur kunngjørt, at hann leggur frá sær eftir at hava sitið tvey valskeið, og stríðið um at taka við eftir hann er hart.

– Valstríðið er tað ljótasta, sum vit hava sæð, síðani Sovjetsamveldið fór í upploysn. Tað sigur ikki so lítið, tí undanfarnu valstríðini vóru avgjørt ikki vøkur, sigur blaðstjórin Stepan Kurpil við Aftenposten.

### Tepur sigur

Fyrra valumfar var tann 31. oktober. Andstøðupolitikarin Viktor Jusjtskenko fekk 39,87 prosent av atkvøðunum, og




*Viðhaldsfólk hjá andstøðuvalevninum Viktor Jusjtskenko ganga stuðulsgongu í høvuðsstaðnum Kiev*

*Mynd: Reuters*

Viktor Janukovitsj, forsætisráðharri, sum er valevni hjá stjórnini, fekk 39,32 prosent. Í morgin skulu veljararnir so gera av, hvør teirra skal verða forseti.

Úrslitið av fyrra valumfarinum vísti týðiliga, at ukrainska fólkið gongur í tveimum bólkum. Janukovitsj hevur serliga lagt seg eftir at fáa atkvøður frá tí russiskt talandi partinum av fólkinum har eysturi í landinum, og hann vann eisini stórsigur har. Tað hóvar stjórnini væl, tí hon vil fegin hava tættari samband við Russland og hevur enntá skotið upp, at russiskt verður tað almenna málið í Ukraina.

Tann nýskipanarhugaði og Evropa-vinarligi Jusjtsjenko vil hava Ukraina tættari ES, og hann fekk stótra undirtøku fyri sínum sjónarmiði har vesturi og har norðuri í landinum.

– Var valið frítt og rættvíst, hevði Jusjtsjenko vunnið greiðan sigur, men myndugleikarnir gera alt, sum gerast kann, fyri at hann ikki skal vinna, sigur Stepan Kurpil, blaðstjóri.

### Svik

Evropeiski samstarvsfelagsskapurin OSCE, ES og USA høvdu sent eygleiðarar til Ukraina at fylgja við fyrra valumfarinum, og teir vóru á einum máli um, at myndugleikarnir høvdu svikað. Eitt nú bleiv avdúkað, at í summum valdømum vóru nógv fleiri atkvøður enn veljarar.

Myndugleikarnir hava ræðið á teimum flestu fjølmiðlunum, og teir gera nógv burtur úr valevninum hjá stjórnini, meðan andstøðuvalevnið valla verður umrøtt. Løgreglan ger eisini sítt fyri at órógva andstøðuna við at steðga veljarafundum og við at órógva vinnulívsfólk, sum hava valt at stuðla valevninum hjá andstøðuni. Bløð, sum ikki eru undir almennum ræði, verða stongd, og í vikuni gingu tíðindafólk hjá almenna sjónvarpinum mótmælisgongu, tí tey vilja ikki lýða boð frá stjórnini.

### Framstig kortini

Hóast valsvik og ágang ímóti andstøðuni heldur politiski granskarin Vira Nanivska, at viðurskiftini í Ukraina eru frægari enn í nógvum av hinum gomlu sovjetlýðveldunum.

– Eg eri púra samd við teimum, sum siga, at myndugleikarnir brúka allar hugsandi snildir, fyri at teirra valevni skal vinna, men kortini vísir hetta valið, at demokratiið í Ukraina hevur gjøt stór framstig, sigur hon við Aftenposten. Vira Nanivska, sum arbeiðir á politiska granskingarstovninum í Kiev, vísir á, at landið hevur eina sterka og væl skipaða andstøðu, og at andstøðan er væl umboðað í tjóðartinginum. Tann politiska kappingin er verulig, sigur hon.

– Ukrainska demokratiið er at líkna við ein næming, sum júst er byrjaður í skúlanum. Vit eru komin til tabellina, men tað fer at taka sína tíð, áðrenn vit koma til støddfrøðina, sigur Vira Nanivska við Aftenposten.

Sambært Stepan Kurpil stúra Leonid Kutsjma, forseti, og hansara ríku vinmenn fyri at missa síni serrættindi, kemur andstøðan til valdið. Tey seinastu árini er Ukraina vorðið meiri og meiri avbyrgt orsakað av politikkinum hjá forsetanum. Hann verður lagdur undir valsvik og korrupsjón, eins og hann eisini er lagdur undir at hava givið boð um at myrða ein tíðidamann. Harafturat verður Ukraina roknað sum eitt land, har næstan ein og hvør kann keypa sær alskyns vápn, bara ein hevur pengar.

*Framhald av s. 34*

Yassir Arafat. Dánjal Poulsen heldur tað vera sera torført at kalla Arafat fyri nakað annað enn ein yvirgangsmann.

– Hann var yvirgangsmaður í Fatha í 1964 tá hann stovnaði PLO, og eg havi onki hoyrt um at hann broytti sína støðu. Í mínum hugaheimi var Arafat yvirgangsmaður og als ikki statsmaður ella diplomatur, sigur Dánjal Poulsen.

Í sama viðfangi sigur Dánjal, at Arafat tosaði við tveimum tungum. Hann tosaði eitt á enskum fyri vesturlendskum fjølmiðlum, og nakað heilt annað á arabiskum, við sínar egnu.

Dánjal heldur ikki, at Arafat gjørdi nakað fyri at finna semju millum stríðandi partarnar.

– Í sambandi við friðarsamráðingarnar við amerikanska forsetanum á odda, í Camp David í 2000, fekk Arafat eitt óhoyrt tilboð: Alt Gaza og næstan alt Judea og Samaria (vestara áarbakka) men hann segði "nei takk". Eg vænti at tað verður seinur dagur at teir fáa eitt tílíkt tilboð aftur. Hví segði hann nei takk?: Jú, um hann segði ja takk, so hevði hann samstundis góðtikið Ísrael, og tað bar honum ikki til, sigur Dánjal Poulsen.

### Torført at fáa frið

Sum áður nevnt heldur Dánjal Poulsen tað vera sera trupult at fáa semju í spurninginum um landamørk, og hvar palestinar skulu hýsast.

– Hetta er eitt mál, sum gongur eini 4000 ár aftur í tíðina, og tað verður ikki lætt at loysa. Eg trúgvi ikki, at tað ber til at finna fulla semju millum árabar og jødar, men ein friðaravtala eigur at bera til. Munurin millum partarnar er alt ov stórur, og tað býr so nógv aftanfyri, sigur Dánjal Poulsen.

Í analysuni aðrastaðni í Tinghelluni verður ført fram, at tað kunnu setast spurnartekin við, um Sharon er rætti maðurin fyri at fáa frið í lag í Miðeystri. Dánjal Poulsen er av teirri sannføring, at tað ikki er avgerandi, hvør situr við ræði í Ísrael. Ongin jødi vil av við land sítt.

– Eg trúgvi ikki, at tað er betri at velja onkran annan heldur enn Sharon. Hann er demokratiskt valdur leiðari fyri landið, og vilja ísraelar ikki hava hann sum leiðara, so velja teir onkran annan næstu ferð. Tað eigur ongin uttan fyri Ísrael at blanda seg uppí, sigur Dánjal Poulsen.

### Eiga ongan stat

Ynski hjá palestinum er at fáa sín egna stat. Stríðið hevur verið langt og drúgt, og sum tað stendur skrivað omanfyri, er tað ikki líkt til, at tað verður nakar happy end í bræði.

Spyrja vit formannin í Vinir Ísraels, so hava palestinar als ongi søgulig rættindi til nakran stat burtur av Ísrael. Palestina varð sundurbýtt millum árabar og jødar í 1922. Arabiski parturin kallaðist Transjordania, og har var gott pláss til allar palestinar ið ikki vildu búgva millum jødarnar.

– Nú tosa øll um, at palestinaárabar skulu hava sín egna stat, men hvør skal geva teimum hann, spyr Dánjal Poulsen.

Besta boðið upp á eitt palestinskt landaøki til teirra nýggja stat heldur Dánjal vera, at Egyptaland gav teimum eitt øki. Yassir Arafat var jú egypti, so tað skuldi verið so líkatil.

– Palestinar fáa ikki bæði Gaza og Vestara Áarbakka; tað ber snøgt sagt ikki til. Heldur kundu teir kanska fingið Gaza og ein part av Sinai frá egyptum; men árabar hava tíverri ikki rætt hond frá síðu at hjálpa teirra egnu brøðrum, sigur Dánjal Poulsen at enda.